Tíðindaskriv

# Ólavsøka í Keypmannahavn



*Frá ólavsøkuni á Norðurbryggjuni í fjør*

**- Ert tú í Keypmannahavn, er upplagt at fara á ólavsøku úti á Norðurbryggjuni**

Triðja árið á rað verður skipað fyri ólavsøkutiltøkum á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Árini frammanundan eru eydnast sera væl. Nógv hevur verið at koma til, og nógv fólk funnu oman á Bryggjuna. Hetta hevur sjálvandi eggja stýrisbólkinum til at taka tiltøkini uppaftur og gera enn meir burtirúr til stuttleika og gaman hjá teimum mongu gestunum, sum bólkurin væntar fara at koma til ólavsøkuna í ár.

Úr skránni kunnu vit nevna cafékonsertina við so gitnum tónleikarum sum Hanus G. Johansen, Hans Hjalta Skaale og Hans Jacob K. Mouritsen. Eisini koma Vestmenn at spæla til dans. Brandur Øssurssons Kvartet spælir jazz á sjálvari bryggjuni. Høvi verður eisini at síggja tað velduga fýrverkið, sum lýsir náttarhimmalin upp yvir Keypmannahavn, og sum onkur vil vera við, kann meta seg við fýrverkið í Tivoli.

Meir um alt hetta og nógv annað, sum fer fram, er at síggja á www.faroehouse.dk, heimasíðuni hjá Føroyahúsinum í Keypmannahavn, sum eisini er ein av initiativtakarunum til ólavsøkutiltakið saman við føroysku feløgunum í Keypmannahavn.

Sum nakað nýtt sýna fleiri feløg og virkir, hvat tey standa fyri og framleiða. Hetta er eisini eitt av endamálinum hjá stýrisbólkinum við ólavsøkuni á Bryggjuni. Sjálvandi verður eisini rúm fyri føroyskum dansi, gudstænastu og kristiligari sangløtu. Har verður gøtusjónleikur, og undirhald fyri børn og ikki at forgloyma kappróður frá ólavsøkuni í Havn og kappróður millum tey føroysku róðraðrarfeløgini í Keypmannahavn. Ólavsøkan á Brygguni verður sett av Herálvur Joensen, sendimáður á føroysku Sendistovuni í Danmark. Ólavsøkukvøld verður midnáttarsangur, røða og fýrverk. Síðan verður dansað til tann ljósa morgun.

Jú, ólavsøkan á Bryggjuni er vorðin ein miðdepil í Keypmannahavn, har føroyingar og danir við áhuga fyri Føroyum hittast.



**Stýrisbólkurin fyri "Ólavsøkan 2006":**

Judith Nielsen, Hvidovre Felagið, Kristvør Hansen og Helen Fossá, Neystið, Jeanette Mikkelsen, Knørrur, Heini Davidsen, Ballerup Felagið, Páll Joen Jacobsen, Tvørabáturin, Martin K. Mouritsen, Martin Fjallstein, Føroyahúsið, Niels Salmony, formaður fyri stýrisbólkin.

# IRF brent 750 tons av húsarhaldsruski í Danmark

**Eini 1000 tons av ruski og burturkasti lógu kring landið, tá brenniovnurin varð settur í gongd eftir umvæling og nýgerð. Tí varð avgjørt, at senda burturkast av landinum at brenna. Men trýstið á brennistøðina er framvegis stórt**

**RUSK**

*Tíðindaskriv frá IRF*

Brennistøðin hjá IRF er umvæld og hevur fingið nýtt roykfiltur. Arbeiðið tók munandi longri tíð enn mett. Tískil varð einki brent í tríggjar vikur. Hetta førdi við sær, at eini 1000 tons av ruski og burturkasti, sum skuldi verið brent, lá kring landið, tá brennistøðin fór í gongd aftur.

### Útflutningur

Neyðugt varð tí at gera eitt størri átak, fyri at minka munandi um nøgdina av ruski og burturkasti. Av tí at brennistøðin hjá IRF sjáldan hevur tøka brenniorku, varð avgjørt at senda alt tað gamla húsarhaldsruskið og nakað av burturkasti frá bingjuplássunum av landinum at brenna.

IRF leigaði Havfrakt til endamálið. Hann kom á Kollafjørð næstseinasta sunnukvøld og sigldi fullfermdur við húsarhaldsruski til Danmarkar seinasta hóskvøld. Mánamorgunin varð byrjað at landa í Århus og mikumorgunin varð arbeiðið liðugt. Lastin vigaði 750 tons.

IRF hevði gjørt avtalu við Brennistøðina hjá Århus Kommunu um at brenna húsarhaldsrusk og líknandi burturkast. Støðin hevur tríggjar brenniovnar og kann brenna 31 tons um tíman. Hóast hetta løgdu teir nakað av ídnaðarburturkasti á eykagoymslu hesar dagarnar, Havfrakt landaði í Århus. Tilsaman brennur støðin umleið 220.000 tons av burturkasti um árið. Burturúr hesum framleiður hon 66 MW av fjarhita og 19 MW av streymi.

### Brenning í løtuni

Men nógv burturkast, sum skal brennast, liggur framvegis og bíðar. Neyðugt er at avgreiða hetta undir so skipaðum viðurskiftum sum gjørligt. Bilar frá IRF heintað burturkast eftir ávísum rutum kring landið. Kundar, sum ætla at koyra burturkast sjálvir, mugu fáa loyvi og tíð at koma.

### Skil og spar

Fyri at lætta um hjá brennistøðini er umráðandi, at burturkastið verður so væl skilt sum gjørligt. Papp, bildekk, trolnet, gørn og plaststórsekkir skulu endurvinnast. Tað er eisini munandi bíligari at sleppa av við skilda tilfarið til endurvinning, enn at lata tað at brenna.

# Nýggja sangbókin væl móttikin




**Bókahandlarnir siga, at viðskiftafólkini frøast um nýggju sangbókina "Okkara Sangbók".**

Nú nýggja sangbókin "Okkara Sangbók" hevur ligið á søludiskinum í einar tveir dagar siga bókahandlar, sum vit hava verið í samband við, at sølan gongur væl og at fólk eru glað um at sleppa at keypa sær eina nýggja sangbók.

Í gamla bókhandli í Havn siga tey, at fólk vísa bókini stóran áhuga og at summi keypa fleiri bøkur. Eisini halda tey, at fólk leingi hava saknað eina nýggja bók og at hon tí kom út í tøkum tíma.

Hjá Hjalmar Jacobsen siga tey seg eisini selja væl, og at fólk taka bókina úr bunkanum og keypa hana uttan fyrst at hyggja í hana. Tey flestu keypa eina, men nógv keypa eisini fleiri.

Sambært Ernst S. Olsen, sum stendur fyri søluni, er tað ov tíðliga hjá teimum at siga, hvussu sølan gongur. Tó sigur hann, at fólk og handlar vísa bókini stóran áhuga, og at onkrir handlar longu hava bílagt fleiri. Teir hava prentað 8000 eintøk av bókini.

Spurdur um teir hava ætlanir um at endurprenta hana, um hon verður útseld, sigur hann, at tað er ikki bara sum at siga tað, tí útlendsku forløgini, sum eiga rættindini til útlendsku løgini, hava bert givið loyvi til eina útgávu. So leyvini skulu sostatt fáast til vega av nýggjum í sambandi við uppafturprent.

**rd.**